# Pedagogbladið

FØROYA PEDAGOG FELAG



Blað Nr. 4 - 2004

www.pedagogfelag.fo

# Oddagrein



*Pedagogfelagið ynskir øllum eini gleðilig jól og gott nýggjár*

Jólini eru nú í hondum, og árið fer so líðandi at halla. Tíðin ber brá av nógvum jólatiltøkum kring landið - og fyri børn flest og vaksin við er hetta ein sera hugnalig tíð. Fyri limir okkara er hetta eisini ein tíð, har ymisk jólatiltøk eru á skránni - og enn eitt ár er um at fara aftur um bak.

Um vit blaða gjøgnum skjótt farna ár, kunnu vit staðfesta, at tað pedagogiska økið hevur verið rættiliga nógv í brennideplinum. Ljós hevur verið varpað á okkara øki - og tað er gott, at vit sum fakbólkur kunnu seta orð á okkara virksemi. Tó so - enn er langt á mál hesum viðvíkjandi.

Tað er ein generellur trupulleiki at seta orð á tað pedagogiska virksemið. Tað er ikki skrivað so nógv um tað sosialpedagogiska økið í grannalondum okkara - og tískil kann tað mangan verða torført at skjalprógva virksemið úti á stovnunum. Hetta er eisini nakað, vit eiga at varpa meira ljós á. Tað verða sett nógv størri krøv til okkum sum fakbólk, og tískil er tað av stórum týdningi, at starvsfólkini, sum varða av hesum økinum, kunnu fáa ta upplæring, sum krevst fyri at røkka hesum máli. Her verður hugsað um øll starvsfólkini. Tað hava verið ymisk skeið hildin um júst hetta evnið, og er tað eisini mín vón, at hetta verður ført út í lívið á okkara arbeiðsøki.

Eitt annað evni, sum hevur verið frammi, er tað vantandi samstarvið millum teir ymisku fakbólkarnar. Føroya Pedagogfelag hevur eisini havt eitt ávíst samband við Føroya Lærarafelag, men hetta sambandið er tíanverri kølnað eitt sindur - men vónandi ber til hjá pørtunum at hittast aftur. Tað má bera til at samstarva meira - og eisini er tað av týdningi, at tey gomlu skottini verða brotin niður, so at samstarvið kann gagna teimum fólkunum, vit eru um, so at tey fáa ta hjálpina ella tænustuna, tey hava rætt til. Í t.d. Danmark hava tey sera góðar royndir av tvørfakliga samstarvinum á tí psykiatriska økinum - og haldi eg eisini, at vit skuldu hugt meira eftir tí møguleikanum her heima. Tað er eitt ávíst samstarv á hesum økinum júst nú, og tað er so sanniliga nakað at frøast um.

Í blaðnum, tygum sita við nú, er m.a. ein viðtala við eitt starvsfólk, sum saknar eina pedagogiska grundútbúgving. Hetta er so sanniliga nakað, arbeiðast má víðari við. Tað eru nógv hjálparfólk, sum sakna eina grundútbúgving, og eigur hesin møguleikin eisini at kannast. Felagið hevur sum kunnugt verið í sambandi við Mentamálaráðið um hetta málið, men enn er so ongin avgerð tikin hesum viðvíkjandi. Føroya Pedagogfelag fer eisini í komandi ári at vísa á tørvin á einari slíkari útbúgving.

Vegna nevnd og starvsfólk felagsins fari eg at ynskja tykkum øllum somlum við familju eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár við tøkk fyri tað skjótt farna.


**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jarvin Feilberg Hansen,
Tlf. 31 75 76
t-post:
jarvin@pedagogfelag.fo

**Fyrisiting:**
Jarvin Feilberg Hansen,
forma›ur
Katrin H. Thomsen,
fyrisitingarlei›ari

**Nevnd:**
Jarvin Feilberg Hansen,
forma›ur.
Ann-Elisabeth Joensen,
næstform.
Bjørghild í Geil,
kassameistari.
Laila Petersen, skrivari
Gitta av Kák,
nevndarlimur.

**Útgevari:**
Føroya Pedagogfelag
Postboks 318
110 Tórshavn
Tlf. 31 75 76
Fax 31 75 73
e-mail:
pedagog@pedagogfelag.fo

**Uppseting og prent:**
Føroyaprent Tel. 314 555

**Lagt til rættis:**
Sp/f Rit&Rá› Tel. 22 92 42

**Seinasta freist**
at senda bla›num tilfar til næsta bla›:
03. februar 2005

**Blaðið verður** prenta› í 1900 eintøkum, kemur út f‡ra fer›ir um ári›, og ver›ur sent limunum í Føroya Pedagogfelag ókeypis.
Onnur áhuga›i kunnu gerast haldarar fyri 100 kr. árliga, vi› at seta seg í samband vi› felagi›.
Loyvt er at endurgeva tilfar úr bla›num (myndir undantiknar) treyta› av at keldan ver›ur uppl‡st.

**Forsíðumynd:**
Børn í útibarnagar›inum Fjallafípuni í Klaksvík




Nýtið heimasíðuna!!!
**www.pedagogfelag.fo**



Á heimasíðuni finnur tú m.a.:
…stovnar
…álitisfólk
…sáttmálar
…lønartalvur
…tryggingaviðurskifti
…kunningartilfar
…tíðindi
…blaðið
…slóðir til aðrar heimasíður

Felagið ynskir, at heimasíðan eisini gerst virkin og viðkomandi í dagsins kjaki. Tí heitir felagið á limirnar um at lata sítt íkast til dagsins spurningar. Sig tína hugsan – skrivið til heimasíðuna!

# Vaktargjøld

**gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð v.m.**
**1.okt.2003 - 1.okt.2005**

Fíggjarmálaráðið og hesi 11 fakfeløgini: Almanna- og heilsurøktarafelagið, Bioanalytikara-felagið, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Føroya Pedagogfelag, Føroya Psykiatrifelag, Ergoterapeutfelagið, Fysioterapeutfelag Føroya, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Heilsuhjálpara-felag Føroya, Ljósmøðrafelag Føroya og Økonomafelag Føroya, hava gjørt semju 18.okt.04 um vaktargjøld fyri tíðina 1.okt.04 - 1.okt.05.

**Gjøldini fyri ólagaliga arbeiðstíð hækka og verða tann 1. oktober 2004 hesi:**

| | Mán. | Týs. | Mik. | Hós. | Frí. | Ley. | Sun. +50% | sk. halgid. +50%+8t |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23 - 06 | 24,22+26,91 | 24,22 | 24,22 | 24,22 | 24,22 | 24,22 | 24,22 | 24,22 |
| 06 - 17 | | | | | | 26,91 | | |
| 17 - 23 | 20,45 | 20,45 | 20,45 | 20,45 | 20,45 | 20,45+26,91 | 20,45 | 20,45 |

Gjald fyri at arbeiða leygardag verður goldið eftir galdandi reglum, men til kl. 24. Fyri at arbeiða mánanátt frá kl. 00, til vaktin endar, verður goldið sama gjald sum leygardag.

**Vaktargjøldini hækka aftur tann 1. oktober 2005 og verða tá hesi:**

| | Mán. | Týs. | Mik. | Hós. | Frí. | Ley. | Sun. +50% | sk. halgid. +50%+8t |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23 - 06 | 25,31+28,12 | 25,31 | 25,31 | 25,31 | 25,31 | 25,31 | 25,31 | 25,31 |
| 06 - 17 | | | | | | 28,12 | | |
| 17 - 23 | 21,37 | 21,37 | 21,37 | 21,37 | 21,37 | 21,37+28,12 | 21,37 | 21,37 |

Gjald fyri at arbeiða leygardag verður goldið eftir galdandi reglum, men til kl. 24. Fyri at arbeiða mánanátt frá kl. 00, til vaktin endar, verður goldið sama gjald sum leygardag.

Verður onnur avtala ikki gjørd, hækka hesi gjøld við %-karminum, sum verður galdandi, tá ið nýggir sáttmálar verða gjørdir tann 1. oktober 2005. Tíðin klokkan 06 skal ikki taka nakað frá nøkrum, sum hava betri áseting í sáttmála.

# Úr innihaldinum


Oddagrein [síða 2]
Úr innihaldinum [síða 3]
Størri arbeiði skal leggjast í fyribyrgjandi partin [síða 4]
Barna OL [síða 5]
At lesa fyri børnum hevur stóran týdning [síða 6]
Mong hildu at stovnurin fór at standa tómur [síða 8]
Setir orð á úrslitið [síða 10]
Arbeiðsroyndir viga ov lítið [síða 11]
Úr heimi hugans [síða 12]
Pedagogútbúgvingin [síða 15]
Fjølment og fjølbroytt leiðarastevna [síða 16]
Dagstovnalógin má endurskoðast [síða 17]
Uppgávubýtið [síða 18]
Barnagarðsøkið royndarverkætlan [síða 19]
Av skipi í barnagarð -ein sonn kollvelting [síða 22]
Fjørutrøllið kom á vitjan [síða 23]
Frítíðaskúlin, er ikki ein skúli [síða 24]
Hugnaðu sær við heimagjørdum [síða 26]
Børnini á Barnaheiminum -geva út fløgu [síða 27]

# Størri arbeiði skal leggjast í fyribyrgjandi partin,

## og bøtast skal um arbei›i› vi› teimum sosialt tyngdu familjunum

Danska stjórnin hevur orðað ein sosialpolitikk, men um hann verður framdur í verki, er ivasamt. Formaður Pedagogfelagsins hevur verið á landsstevnu í Danmark

Í døgunum 8. - 11. november hevði Socialpægagogernes Landsforbund landsfund. Tað hevur verið vanligt, at Føroya Pedagogfelag verður boðið við - og soleiðis var eisini hesa ferð.

Landsfundurin varð hildin á Hotel Nyborg Strand á Fjóni, og karmarnir kring landsfundin vóru avbera góðir.

Sum gestur á hesum landsfundi fekk eg møguleika at fylgja við teimum trupulleikum, danska fakfelagið fyri sosialpedagogar hevur at dragast við. Tað hava verið nógvar skerjingar á tí sosialpedagogiska økinum í Danmark, og tað kom greitt til sjóndar, at SL var alt annað enn nøgt við førda politikkin hjá sitandi stjórnini.

Í Danmark verður eisini arbeitt við at endurskoða útbúgvingina, eins og gjørt verður í Føroyum, og var hetta eisini eitt av høvuðsevnunum á landsfundinum. SL hevur saman við BUPL verið í einum drúgvum orðaskifti við undirvísingarmálaráðharran í Danmark, Ullu Tørnæs, um ta nýggju endurskoðaðu útbúgvingina, sum verður longd úr 3_ ári til 4 ár.

Høvuðskrøvini frá SL í starvslæruni í einari nýggjari pedagogútbúgving vóru:

- Starvslæran skal vera fíggjað við vanligum lestrarstuðli, har innlæring verður sett í brennidepulin
- Treytað útbúgving av starvslærarunum
- Samstarvið millum skúla og stovnar skal optimerast.

Í verandi útbúgving eru næmingarnir, tá teir eru í starvslæru, løntir. Tað vil siga, at teir eru við í normeringini á stovninum - og fáa tískil ikki ta neyðugu tíðina ella hjálpina frá einum vegleiðara at fokusera á tann ástøðiliga partin.

Sum støðan er nú, so verða hesi krøvini ikki gingin á møti - og hetta er veruliga nakað, sum hevur fingið øði í danska felagið. Stjórnin hevur annars orðað ein sosialpolitik, sum í sær sjálvum sær spennandi út, og sigur hon eisini, at krøvini til framtíðarpedagogarnar verða størri og størri . Størri arbeiði skal leggjast í tann fyribyrgjandi partin, og arbeiðið við teimum sosialt tyngdu familjunum skal eisini gerast betri.

Men SL og BUPL hava fingið at vita, at starvslæran verður ikki broytt, og meta feløgini hetta verða eina vanlukku fyri tað pedagogiska yrkið. Enn er ongin endalig avgerð tikin hesum viðvíkjandi, men útlitini tykjast heldur døpur.

**Nú kemur álmanakkin**

Álmanakkin hjá Pedagogfelagnum, sum LÍV letur sín góða stuðul til, verður sendur stovnunum undan jólum. Eru limir, sum ikki hava fingið álmanakkan, eru teir vælkomnir at venda sær til felagið.




### LÍTLI PæTUR EITURKOPPUR ......

Ofta hoyrast børn í barnagar›saldri syngja um
"Lille Peller Ellerkop".
Illa gongst at
frambera bleyta,
danska d'i›. So hví ikki syngja
hann á føroyskum, solei›is sum
nógv onnur barnagar›sbørn gera:

Lítli Pætur Eiturkoppur
klívur upp á gar›in.
So kemur regni›
og skolar Pætur ni›ur.
So kemur sólin
og turkar hansar' li›ir.
Tá tú roynir aftur, Pætur,
ver tá meira varin.








# Útvið 400 børn við í Barna OL

Saman við 70 starvsfólkum og pedagognæmingum luttóku útvið 400 børn, sum ganga í frítíðarskúla í Tórshavnar Kommunu, saman við børnum, sum hava sína dagligu gongd á Margarinfabrikkini, í sokallaðum Barna OL, sum kommunan skipaði fyri fyrst í november mánaði. Tiltakið fór fram í Badmintonhøllini og á parkeringsøkinum við høllina, á høllini á Hálsi, í viðalundini og á økinum kring Miðstovnin í Gundadali.

Bogi Andreasen frá Margarinfabrikkini samskipaði saman við Angelu Petersen, leiðara á frítíðarskúlanum í Badmintonhøllini, tiltakið, og hann letur sera væl at. Undirtøkan var framúr góð, og alt eydnaðist, sum tað skuldi, bæði allar tær kappingarnar, sum vóru, og eisini stóra tiltakið við øllum undirhaldinum í Badmintonhøllini seinasta OL-dagin.

Barna-OL varð skipað soleiðis, at starvsfólk á frítíðarskúlunum vóru við at leggja tiltakið til ræ ttis og fremja tað í verki. Eisini vóru fólk frá Margarinfabrikkini við, og sama við næmingum á pedagogskúlanum.

Eitt stórt og arbeiðskrevjandi tiltak vóru øll samd um, men tað eydnaðist so mikið væl, at áhugi er fyri at skipa fyri einum tílíkum tiltakið aftur næsta ár.







Alla tí›ina er ney›ugt at styrkja áhugan fyri bókini, heldur lei›arin fyri Bókadeild Føroya Lærarafelags, Niels Jákup Thomsen.



# at lesa fyri børnum

## Hevur stóran týdning

**- Nógvar kanningar eru gjørdar, og allar vísa, at børn, sum tú tosar nógv við ella lesur nógv fyri, mennast skjótari málsliga, sigur Niels Jákup Thomsen, leiðari á Bókadeild Føroya Lærarafelags, sum fegnast um, at áhugin fyri føroyskum barnabókum økist**

Í dag er ikki, sum tá alt húsfólkið savnaðist í køkinum, og sagt var frá, og lisið var fyri børnunum. Annað undirhald var ikki. Einki sjónvarp og ongar teldur. Børnini lurtaðu áhugað eftir tí, sum sagt var frá, og hetta hevur ment børnini almikið málsliga, heldur Niels Jákup Thomsen.

Men í dag vita vit um nógv børn, sum lítið og einki samband hava við vaksin fólk. Liva mest sum í sínum egna heimi framman fyri sína teldu ella sjónvarp. Málsliga er hetta lítið mennandi, og tí heldur Niels Jákup tað vera sera gott høvi hjá vaksnum at nýta bókina saman við børnunum. Hann vísir á, at allar kanningar siga, at verður sagt frá og lisið saman við børnunum, gevur tað børnunum góða málsliga barlast. Børn hava eisini sera góð evni at taka hendan førleika til sín. Sagt verður, at innlæringarevnini eru í hæddini, tá tey eru um tíggju ára aldur, og tey læra millum 3 og 4000 nýggj orð um árið. Kanska skilja børn ikki øll tey nýggju orðini beinanvegin, men tá tey hava hoyrt tey endurtikin, situr tað.

### Lesið í heimi, skúla og á dagstovni

Niels Jákup sigur seg hava varðhugan av, at mangan gevast foreldur at lesa fyri børnum, tá børnini sjálv duga so frægt at lesa, men tey eru eisini onnur, sum halda fram. Tað heldur hann vera skilagott; hetta er mennandi, og børnunum dámar tað væl, og so er tað eisini eitt gott høvi at vera saman við børnunum. Úrvælið av barnabókum er munandi økt hesi seinastu árini, og tað er tilvitanin at lesa fyri børnum eisini, og tað heldur Niels Jákup vera ógvuliga umráðandi, nú so nógv annað dregur. Í skúlunum hevur altíð verið lisið fyri børnum, og tað verður eisini gjørt á dagstovnunum, og at foreldur og onnur lesa heima fyri børnum, heldur Niels Jákup eisini hava stóran týdning.

### Bókin fer neyvan av móta

Hjá Bókadeild Føroya Lærarafelags, sum er tað forlagið, ið gevur flestu barnabøkurnar út, er sølan økt seinastu árini, og Niels Jákup sigur seg hava varðhugan av, at sama er hjá øðrum forløgum, men tá børn koma í ein ávísan aldur, gevast mong teirra at lesa bøkur. Tá er annað sum dregur. Serliga hjá dreingjum eru tað teldubløðini, men sannlíkt er, at tey børn, sum hava fingið gott í beinið bókliga, venda einaferð aftur til bókina, heldur Niels Jákup, sum sigur seg ikki ivast í, at bókin framhaldandi fer at hava sín leiklut, hóast kappingin frá øðrum miðlum er stór.



Á dagstovnunum ver›ur dúgliga lisi› fyri børnunum, og ta› dámar teimum væl.

### Styrkja áhugan fyri bókini

Men leiðarin fyri Bókadeildini heldur ikki, at til ber bert at seta seg afturá, men at tað alla tíðina er neyðugt at styrkja áhugan fyri bókini. Hann vísir á, hvussu tey gera í Finlandi, sum er eitt tað mest framkomna landið innan skúlaskap. Har verður sera stórur dentur lagdur á at lesa fyri børnum og at gera átøk frá almennari síðu at styrkja hesa siðvenju, og tað heldur hann eisini, at vit eiga at gera í Føroyum. Niels Jákup heldur, at úrvalið av barnabókum er rímiligt, og alt fleiri koma við jøvnum millumbilum, men longri er ímillum ungdómsbøkurnar. Teimum kundu vit havt fleiri av, tí umráðandi er at hava nóg mikið av bókum á móðurmálinum, so børnini fáa lært seg málið væl og virðiliga. Duga tey ikki tað, verða tey eftirbátar, sigur Niels Jákup Thomsen.






**Jórun Niclasen** samskipar barnaansingar tilbo›ini hjá Klaksvíkar Kommunu

## Tey smæstu í dagrøkt og síðani í barnagarð

Lítið er at ivast í, at dagrøktin í Klaksvíkar Kommunu riggar væl. Í hvussu er so mikið væl, at foreldur at teimum smæstu børnunum upp í trý ára aldur heldur vilja hava dagrøktarpláss enn stovnspláss. Men tá børnini eru vorðin trý, er stórt ynski um, at børnini koma í barnagarð. Onnur kann niðurstøðan ikki vera sambært Jóruni Niclasen, samskipara av dagansingartilboðunum hjá Klaksvíkar Kommunu.

Og júst hetta hevur politiski myndugleikin í Klaksvíkar Kommunu eisini tikið til eftirtektar, tí nýggi dagstovnurin, sum nú skal byggjast Undir Grashjalla, er bert ætlaður til barnagarðsbørn. 40 í tali. Peningaliga játtanin til barnagarðin er samtykt, og farið verður undir byggingina nú beinanvegin. Ætlandi stemdur barnagarðurin liðugur næsta summar.

Men tørvurin er størri enn so, og tí eru longu fyrireikingar gjørdar til næsta dagstovnin. Hesin verður bygdur Undir Hálsi, og har skal verða pláss fyri 20 barnagarðsbørnum og 12 í vøggustovu.

Um tvey ár ella so er barnaansingartørvurin nøktaður í Klaksvíkar Kommunu.

# Mong hildu, at stovnurin fór at standa tómur

- men so var› ikki. Vit kundu saktans fylt ein stovn afturat, og gott var, at vit bygdu n‡tt til endamáli›, heldur enn at keypa okkurt gamalt, sigur Julianna í Heimistovu, lei›ari á Samb‡linum og Bústovninum á M‡ruvegi í Klaksvík

Í skjótt trý ár hava ung sum eldri menningartarnað og fólk við autismu búleikast í sambýlinum og bústovninum á Mýruvegi í Klaksvík. Eitt tað fyrsta, tú leggur til merkis, tá tú trínur inn um gátt, er, at her trívast bæði búfólk og starvsfólk í hugnaligum og rúmligum umhvørvi. Stovnurin er sum hin fyrsti og einasti í Føroyum, burtursæð frá Eirargarði í Havn, bygdur til endamálið, og tað eru øll sera fegin um. Tað er ikki tað sama, sum mangan verður gjørt, at finna okkurt gamalt, og síðani royna at laga tað til endamálið, heldur leiðarin á stovninum, Julianna í Heimistovu.

Stovnurin er í tveimum eindum. Sambýli fyri menningartarnað og bústovnur til fólk við autismu. Í sambýlinum búgva seks fólk við sera ymiskum tørvi. Flestu teirra arbeiða hvønn dag á varda verkstaðnum Uppi í Brekku. Á bústovninum búgva fýra ungfólk við autismu, sum umframt at ganga í skúla tveir tímar um dagin gera nógv við at svimja, ganga túrar og takast við ymisk ítriv. Teir báðar skúlatímarnar um dagin heldur Julianna vera alt ov lítið, men meira kann Mentamálaráðið ikki bjóða teimum, og tað er hon sera hørm um.

### Tørvurin enn størri

Tað var uttan iva stóra trýstið á umlættingarheimið Dáan og teir alt ov tronligu karmarnir hjá fólki við autismu á bústovninum Fjálgalon á Garðavegi, sum fekk bæði politikarar og onnur at rakna við og taka stig til, at okkurt mátti gerast.

Sambýlið og bústovnurin á Mýruvegi kunnu sigast at vera eitt talandi dømi um, at skapar tú karmarnar, økist eisini tilvitanin um tørv. Julianna í Heimistovu greiðir frá, at tá fyrireikingar vóru gjørdir til at byggja stovnin við Mýruveg, vóru mong, sum hildu, at stovnurin fór at standa tómur, men so var ikki. Stovnurin fyltist skjótt, og fólk fingu veruliga eyguni upp fyri tørvinum og sóu, hvussu ein tílíkur stovnur kundi lætta um hjá nógvum. Í dag er heilt greitt, at hesin stovnurin nøktar ikki allan tørv, og tí heldur Julianna, at tey uttan iva kundu fylt ein líknandi stovn afturat. Stovnurin á Mýruvegi hevur lætt munandi um umlættingina víðahvar í býnum, og ger hetta eisini sítt til, at bæði hesin og aðrir stovnur, kunnu arbeiða meira málrættað.







*Flestu av teimum á sambýlinum arbeiða á Varda Verkstaðnum Uppi í Brekku.*



### Undirsjóvartunnilin gevur nýggjar møguleikar

At geva teimum, sum búgva á stovnunum við Mýruvegin fleiri ítrivstilboð heldur Julianna vera ynskiligt. Hóast vardur verkstaður fyri menningartarnað er í Klaksvík, ber illa til hjá fólki við autismu at virka har saman við øðrum, og tí heldur hon tað vera ynskiligt at fáa ein vardan verkstað til fólk við autismu. Hon ivast ikki í, at tørvur og grundarlag hevði verið fyri einum tílíkum í Klaksvík, men nú fast samband verður millum Klaksvíkina og Eysturoynna, kundi verið ein møguleiki fyri samarbeiði millum oyggjanar, at gjørt ein tílíkan verkstað saman við Eysturoynni.





**Heimagjørt, lætt og skilligt**
- fjølin vi› lissunum fremst á myndini. Karl Martin Samuelsen heldur, at pedagogútbúgvingin ger ov líti› burtur úr frálæruni vi› fólki sum bera brek. Fólk vi› serligum breki, skulu hava serliga frálæru

# Setir orð á úrslitið

Karl Martin Samuelsen arbeiðir sum pedagogur á bústovninum á Mýruvegi, og hann fylgir sera væl við, hvussu hansara arbeiði við fólki við autismu gongur. Hvønn dag og fyri hvørji tiltøk, hann hevur saman við honum, hann er stuðul hjá, skrivar hann niður, og í mongum førum tekur hann myndir og video.

Hetta tænir fleiri endamálum, sigur Karl Martin. Í fyrsta lagi fyri at síggja, hvørjir arbeiðshættir eru bestir at bøta um viðurskiftini hjá honum, sum ber brek, og somuleiðis at fylgja gongdini, - at síggja eina framgongd, sum sjálvandi hevur nógv at siga hjá foreldrunum og samstundis hjá honum sjálvum, - at arbeiðið ikki er til fánýtis. Hetta, at dokumentera - seta orð og myndir á eina verkætlan - kann eisini vera ein hjálp og gerast eitt amboð hjá øðrum, sum arbeiða við fólki við autismu.

Og sama er við undirvísingaramboðum. Nakað so einfalt hjá teimum flestu sum at binda lissur, skulu tey við autismu læra, og til tess hevur Karl Martin fingið sær eina fjøl, har hann hevur fest lissur á. Heimagjørt, lætt og skilligt - og tað riggar, sigur hann.

Karl Martin heldur, at alt ov lítið um arbeiði við fólki við autismu kemur fyri í útbúgvingini hjá pedagogum. Áhugan, at arbeiða við fólki við autismu, fekk Karl Martin, tá hann var í starvsvenjing, og at hann tá fekk møguleika at koma á eitt skeið, hesum viðvíkjandi, gjørdi bert áhugan enn størri. Síðani hevur hann verið á fleiri líknandi skeiðum, sum hava gjørt tað møguligt at fylgja við tí, sum hendir á hesum øki. Millum annað hetta, at síggja hvussu umráðandi tað er at taka støð í hinum einstaka. Eitt hugskot kundi verið, at pedagogskúlin, av og á, fekk serfrøðingar at undirvísa næmingunum um fólk, ið bera brek. Fólk, sum bera serlig brek, skulu hava serliga frálæru, sigur Karl Martin, sum eisini heldur, at myndugleikarnir játta ov lítið av pengum á hesum økinum. Var peningaliga rásarúmið størri, hevði borið til at fingist meira við gransking, undirvísingaramboð og eina betri normering.





Starvsfólk trívast væl á Dáanum. Malan, sum hevur starvast á Dáanum øll 15 árini, og Noomi høvdu nógv at práta saman um, tá vit hittu tær á Dáanum herfyri

# Arbeiðsroyndir viga ov lítið

**Noomi Nielsen í Klaksvík hevur arbeitt á pedagogiska økinum í fjór›ingsøld. Hon má tí sigast at hava drúgvar arbei›sroyndir, men hon kundi hugsa› sær eina størri ástø›iliga vitan, men ta› ber ikki til**

Noomi Nielsen í Klaksvík starvaðist á barnaheiminum í Havn í trý ár. Síðani í Drotning Margrethu Barnagarðinum í Klaksvík í 15 ár, og hevur nú sjey ár á baki á umlættingarheiminum Dáanum í heimbýi sínum. Sum vera man, hevur hon drúgvar arbeiðsroyndir. Hon hevur trivist sera væl á sínum arbeiðsplássum, men hevur mangan ynskt sær meira av fakligari vitan, og tí hevur hennara ynski verið - og er tað enn - at nema sær eina pedagogiska útbúgving. Men tað ber ikki til. Hennara vanlukka er, at hon fór úr 9. flokki í fólkaskúlanum og hevur ikki aðra ástøðiliga útbúgving. Noomi sleppur ikki á pedagogskúlan, tí hon lúkar ikki upptøkukrøvini.

- Eg haldi, at tað er í fínasta lagi, at fólk útbúgva seg bæði væl og virðiliga við øllum teimum miðnámsligu tilboðum sum eru, men eg haldi kortini, at lívsroyndirnar í arbeiðslívinum áttu eisini at talt við. At eg ikki fái møguleika at nema mær fulla útbúgving sum pedagogur, má eg bert finna meg í, men hetta, sum tosað verður nú um, í sambandi við eina sokallaða grundútbúgving fyri pedagogar, tiltalar meg rættiliga nógv, sigur Noomi.

Tað er ikki, tí hon er so bangin fyri, at útbúgvin pedagogur trokar hana úr starvi, tí tørvurin á útbunum fólki er í dag so stórur. Á Dáanum eru øll størvini normerað sum pedagogstørv, men har eru bert tveir útbúnir pedagogar. Men tað ver heldur tað at fáa eitt meira haldgott ástøðiligt innlit, hon kundi hugsað sær.

Spurd, hví hon heldur, at fleiri pedagogar ikki søkja sær starv eitt nú á Dáanum, sigur hon, at tað heldur er arbeiðstíðin enn lønin, sum heldur teimum aftur. Dagvaktin er frá átta á morgni til fýra seinnapartin, men so er náttarvaktin frá klokkan fýra seinnapartin til átta á morgni, og tað er skilligt ikki serliga tiltalandi fyri yngri fólk.

### Eitt sindur um Dáan

Dáin er umlættingarheim fyri heimabúgvandi menningartarnað. Har er pláss fyri fimm fólkum, og ynskini eru rættiliga ymisk at koma til umlættingar á Dáanum. Onkur ynskir at vera har eina nátt um vikuna, onkur annar eitt vikuskifti um mánaðin, ein tannáringabólkur kemur higar eitt vikuskiftið um mánaðin, og ungdómsbólkar koma her av og á. Harafturat hevur Dáin eitt dagtilboð, har trý fólk koma frá skúla, og eru har til um fimmtíðina.

Dáin og umlættingarheimini í Havn og í Sørvági arbeiða saman. Fýra ferðir um árið fáa umleið 50 fólk skriv, har spurt verður um, hvønn tørv á umlætting tey hava. Síðani hittast leiðararnir á hesum heimum at viðgera hesar umsóknir og at taka støðu til, hvør kemur her, har og nær.

# Úr heimi hugans




# Bitar av Ternuryggi

Tá Asta spurdi, um eg vildi taka drunnin, svaraði eg nei, so avgjørt nei.
Eg umhugsaði hetta tó, og seinni spurdi eg meg sjálva, hví svarið var nei; og eg kom til ta niðurstøðu, at eg visti ikki, hvat eg skuldi skriva um.
Givið er tó, at ein drunnur má hava móttakara, og endin var so, at eg játtaði.
Tankarnir hava hurrað og snurrað um alt, eg havi upplivað her á Ternuryggi í skjótt 10 ár. Sum tankarnir mala, finni eg út av, at eg havi upplivað eina rúgvu, spurningurin var bert, hvussu eg skuldi fáa tankarnar niður á pappír. So eg mátti bara leypa í meldurin og fara í gongd.
Tá eg byrjaði á stovninum, vóru 22 barnagarðsbørn og 12 vøggustovubørn. Nú eru 40 í barnagarðinum og 12 á vøggustovuni. Starvsfólkini er sjálvandi eisini vorðin fleiri; í dag arbeiða 12 vaksin í mun til 7 fyri 10 árum síðan.
Sum nýklaktur námsfrøðingur byrjaði eg í barnagarðinum við nógvum góðum hugskotum og góðari barlast frá skúlanum, har eg las í 3 _ ár. Eg minnist enn, hvussu móð eg var í høvdinum av inntrykkum og í kroppinum av fysiskum aktivitetum tann fyrsta mánaðin. Eg, sum hevði sitið still á einum stóli í so langa tíð, skuldi nú til at uppliva lívið á ein heilt annan hátt. Tað var so avgjørt øðrvísi, enn eg hevði hugsað mær, og tá kroppurin so nøkulunda hevði vant seg við rørslur aftur, gekk framúr væl.
Tað var deiligt aftur at sleppa at vera millum børnini, at duga at skilja børnini betur undir skiftandi innlivingum, umstøðum og upplivingum. Tað at njóta lívið, uppliva og sansa tað saman við børnunum er lívsjáttandi.
Tað at kunna skreiða um veturin, vassa um summarið, renna og hugna sær á ymiskan hátt, at uppliva heimin og náttúruna gjøgnum børnini, við teirra eygum og ikki minst teirra livandi forvitni.
Tá eg byrjaði, var eg so heppin at fáa ábyrgdina av skúlabørnunum og at uppliva tey á legu. Tey seinnu árini var legan á Selatrað, og má sigast, at hetta var eitt væl valt pláss, bæði tá hugsað verður um ríku náttúruna og góðu umstøðurnar hjá børnunum at gista í.
Børnini vóru glað fyri at hava "sítt egna kamar at sova í", og nógvar góðar kamar-søgur kundu verið fortaldar um hesar túrar. Eg taki tó bert eina burtur úr, sum er um, at børnini hildu meg vera harðmælta. Eg má so havi borið orð fyri at vera heldur harðmælt; onkuntíð hevur tað verði gott - tað var tað so í øllum førðum á hesum túrinum.

### Vit vóru trý inni í einum kamari, tveir dreingir og so eg.

Dreingirnir lógu í hvør sínari koyggjusong og kravdu, at eg skuldi liggja á gólvinum hjá teimum, eg skuldi liggja beint innanfyri og venda andlitið móti vindeyganum. Eg var ógvuliga glað og stolt, teir høvdu sjálvir biðið meg um at sova inni hjá sær.
Sum vit soleiðis liggja, sigur tann eini drongurin við hin: "Fortel henni, hví vit vilja, at hon skal sova her!" "Nei," svarar hin, "eg tori ikki." Hin sigur aftur: "Jú, sig tað bara, hon verður ikki ill; eg veit, at hon ikki blívur ill". Forvitin sum eg eri, spurdi eg fleiri ferðir: "Hvat er tað?" So gongur ein góð løta, og eg gerist alt meiri forvitin, kanska eitt sindur spent eisini. Jú, so einaferð kemur tað spakuliga frá dreinginum, sum liggur í ovaru koyggju: "Jú, veit tú, um nú ein bandittur kemur inn gjøgnum hurðina í kamarinum hjá okkum, so rópar tú so hart, at hann blívur so bangin, at hann rýmir og ikki torir at koma inn."
Eg bleiv heldur kløkk, hevði ikki júst væntað hetta og hugdi upp á teir báðar; teir sóu sera spentir og ivingarsamir út. Eg hugsaði meg um eina løtu og svaraði: "Tit siga nakað, tað er sikkurt gott, at eg rópi so hart, at eg kann gera banditar bangnar." "Ja," siga teir báðir aftur, "og veit tú hvat, Nicolina, so kunnu vit eisini ansa eftir tær, um nú ein bandittur kemur inn ígjøgnum vindeygað, tí vit liggja so langt uppi, og tú liggur heilt niðri á gólvinum." Ja, tað er gott, at vit soleiðis kundu ansa eftir hvørjum øðrum, tað vóru vit trý samd um. Eg føldi meg stolta og glaða fyri stóra álitið, teir góvu mær, sjálvt um eg helst hevði væntað okkurt annað. Vit fingu eina super legu á Selatrað.
Gott samstarv millum starvsfólk og foreldur hevur stóran týdning fyri barnið og trivnaðin. Tað er heilt víst, at tað ger mun við góðum og tøttum foreldrasamstarvi við áliti og opinleika báðar vegir.
Tað mátti eg ásanna ein morgun tá ein mamma kom við soninum í barnagarð og sigur við meg: "Tú Nicolina, er tað satt, at tú blakaði sonin hjá mær út í garðin í gjár?" Eg bleiv kløkk. "Ha, hvat sigur tú?" "Jú," sigur hon, "í gjárkvøldið, tá eg skuldi vaska honum og lata hann í náttklæði, síggi eg, at hann hevur fleiri blá merki á skinnabeininum. Eg spurdi sonin: Hví hevur tú so nógv merki á beininum?" "Jú," sigur hann, "Nicolina blakti meg út í garðin." "Ha? Hvat sigur tú, hvat gjørdi hon?" "Jú, hon blakti meg út í garðin." "Men hvar vóru so hinar konurnar í barnagarðinum?" "Tær? Jú, tær vóru og roykt og drukku kaffi!" svaraði drongurin, sum um tað var vanligt hjá okkum. Mamman kláraði so dánt at halda sær við ikki at flenna, tá hon tosaði við meg. Eg fór at hugsa og hugsa, hvar í verðini hann hevði hetta frá, jú so mintist eg. Vanligt er, at tá børnini hava etið matpakka, fara øll børnini út í garðin at fáa sær fríska luft. Tá ið eg hevði latið hann og hini børnini í regnklæði ella kavadrakt, plagdi eg at taka í selarnar í herðarnar og í rumpuna, telja og svinga tey aftur og fram og telja "1 og 2 og 3 og nú blakið eg teg út í garðin," fyri so at seta tey spakuliga niður í túnið. Soleiðis plagdi eg at spæla vit tey løttu børnini, fyri á ein stuttligan hátt at fáa børnini út í garðin at spæla.
Tá vit báðar høvdu flent eina góða løtu eftir hetta prát, vóru vit samdar um, at ymiskt er, sum børn fata spælið hjá okkum vaksnu.
Síðani hetta havi eg altíð fortalt foreldrunum, tá eg havi spælt ella gjørt eitthvørt óvanligt ella "vilt" saman við teimum, so slepst undan misskiljingum.

### At arbeiða við børnum er deiligt og gevandi, tað verður ongantíð trivielt, eingin dagur er líka.

Tá eg hevði arbeitt í barnagarðinum í 3 ár, gjørdist eg leiðari í nøkur ár, til vit í 2000 vóru so heppin at fáa ein eftirnølara, eina deiliga gentu. Eftir hetta valdi eg at fáa niðursetta tíð og at arbeiða í Vøggustovuni. Tað er tað besta, eg nakrantíð havi gjørt, eg eri komin á mína røttu hill her í lívinum.
Øðrvísi er at arbeiða við lítlum børnum, sum ikki duga so væl at tosa. Her brúka vit okkum á ein heilt annan hátt; vit skulu hava empati, skulu skilja børnini og innlivingar teirra.
Seinastu árini er skipað fyri góðum skeiðum og ráðstevnum, sum styrkja førleika okkara, har empati er týdningarmikil partur. Eg síggi, hvussu týdningarmikið og fyribyrgjandi arbeiðið er í eini vøggustovu, og kann ikki annað enn mæla øllum, sum á ein ella annan hátt ivast, at royna at arbeiða við heilt smáum børnum.
Eg eri sera takksom fyri góða samstarvið við øll á og rundan um stovnin.
Eg gleði meg hvønn dag at fara til arbeiðis og gleðist um tað stóra álit vit fáa, tá foreldur velja okkara vøggustovu til barn sítt.

Eg sendi drunnin víðari til Gislu Poulsen:
Gisla skal hava tøkk fyri drunnin at hevja,tað man sanniliga sína kvinnu krevja.

Vinarliga
Nicolina Skaalum



Pedagogútbúgvingin

# Mest umráðandi útbúgvingin, sum til er

**Alt ov ofta lata vit í Føroyum óútbúgvin og royndarleys ungfólk taka sær av okkara børnum. Læraraskúlin fær næstan 200 umsóknir á hvørjum ári og tekur bara 24 inn. Tá er ikki lætt at kappast, men alt, ið horvir rætta vegin, ger mun, eisini stutt og long skeið hjá hjálparfólki, sigur Pauli Nielsen, skúlastjóri**

Á aðalfundi Pedagogfelagsins í vár segði formaðurin í Pedagogfelagnum, Jarvin F. Hansen m.a.:

-Tað finnast nógv góð hjálparfólk á stovnunum. Hesi hava helst ynskt sær eina størri teoretiska vitan innan pedagogiska fakið. Teimum átti at staðið í boði at fingið eina grundútbúgving í t.d. eitt ár, sum kundi givið teimum størri førleika og ábyrgd á stovninum. Og hann legði afturat: Hetta skal sjálvandi ikki skiljast soleiðis, at eg mæli til at loysa tørvstrupulleikan við, at hjálparfólkini fáa eina ávísa upplæring, og so eru tey pedagogar. Heldur skal tað skiljast so, at í fyrsta lagi hava hjálparfólkini bara gott av at fáa nakað av fakligari vitan, og harafturat kundi tað ført við sær og hjálpt til, at hjálparfólk fáa áhuga fyri at útbúgva seg sum pedagogar - ein ávís fyrireiking at fara á skúla, sigur pedagogfelagsformaðurin.

## 24 inn av 200

Pedagogblaðið hevur spurt Paula Nielsen, skúlastjóra, um hann heldur, at hetta er gott hugskot.

- Tað er altíð vert at hugsa um at menna tey, sum hava við børnini at gera, og við tey, sum av serligum umstøðum hava fyri neyðini, at onnur veita teimum stuðul. Yrkisliga at hava við børn og onnur at gera, sum hava serligt fyrilit fyri neyðini, er ikki hvørs mans føri. Kortini velja vit í okkara samfelag alt ov ofta at lata óútbúgvin og royndarleys ungfólk gera hetta arbeiðið. Við tí í huga haldi eg, at allur bati bøtur, sigur Pauli Nielsen, sum heldur, at vit í Føroyum leggja ov lítla orku í at útbúgva pedagogar, sum hann heldur vera mest umráðandi útbúgving, sum til er. Hann sigur, at Læraraskúlin fær næstan 200 umsóknir á hvørjum ári og tekur bara 24 inn. Tá er ikki lætt at kappast, men alt, ið horvir rætta vegin, ger mun, eisini stutt og long skeið hjá hjálparfólki.

## Eingin tykist at lurta

Men hvør fær mest gagn av eini tílíkari grundútbúgving? Óroyndu hjálparfólkini, tey meira royndu ella tey, sum hava í hyggju at fara á pedagogskúla?

-Veruleikin er tann, at á dagrøktarøkinum er fjøldin av hjálparfólki ungfólk, sum koma og fara eftir, hvat ið tey annars hava í boði av arbeiði og útbúgving. Av somu grund man vera trupult at fáa stovnar og myndugleikar at nýta pening upp á at menna tey til ta uppgávuna, og tað er helst ymiskt frá stovni til stovn, hvat pedagogarnir gera við hetta í sínum samstarvi við hjálparfólkini.

-Hugsa vit um tey, sum hava verið hjálparfólk í styttri ella longri tíð, hava hesi mangan eitt ynski um at fáa útbúgving sum pedagogar, men tey sleppa av ymiskum grundum ikki inn. Oftast tí at teimum vantar formliga førleikan. Tey hava nógvar royndir, og tey hava tænt skipanini væl. Tey áttu at fingið høvi at tikið útbúgvingina eftir einum leisti, sum passar teimum, t.d. við einum fyrireikingarári, sigur Pauli Nielsen, sum sigur seg so mangan hava gjørt vart við hetta, men tað tykist, sum eingin lurtar. Hann heldur, at hetta hevði verið fyrimunurin, at hjálparfólk við skortandi formligum førleika høvdu fingið møguleika at útbúgvið seg til pedagog.

## Setir vón til yngru politikararnar

Men kann tað ikki hugsast, at ein vansi er, at tilboðið virkar øvugt, so fólk als ikki fara at læra til pedagog, men halda, at eitt styttri grundskeið er nóg mikið?

-Ja, ein stutt útbúgving, sum nevnd er her, kundi freistað politisku skipanina til at hildið uppaftur meira aftur í at útbúgva pedagogar bæði væl og virðiliga. Men tað fer vónandi at broytast. Yngra liðið, sum nú kemur fram í politikki, veit, hvat ið væl at sær komnir pedagogar eru verdir.

## Ella kann hetta geva fólki veruligan hug at fara at læra til pedagog?

-Tað er mín roynd, at stutt pedagogisk skeið veruliga geva hugaðum fólki luft undir veingirnar, so tann parturin átti at verði styrktur munandi. Eitt heilt ár er ov freistandi hjá myndugleikunum. Teir fara avstað við agninum, og tá verður fongurin lítil hjá børnunum, heldur Pauli.

## Játtanin er bæði synd og skomm

Annar spurningur er so, hvussu skúlin er fyri at taka á seg eina tílíka grundútbúgving

-Læraraskúlin fær eina játtan, sum bæði er synd og skomm. Sjálvandi má peningur til alt virksemi, men eg haldi, at peningurin var betur farin til at økja um talið av lesandi á pedagogútbúgvingini enn til eitt afturvendandi fyrireikingarár. Pedagogútbúgvingin er, sum hon er nú, helst ódýrasta útbúgvingin í Føroyum. Vegna vantandi orku heima er eitt alsamt vaksandi lið í ferð við at taka hana á netinum, serliga í Danmark. Tað kann vera einasti møguleikin hjá summum, men økt virksemi heima hjá okkum sjálvum hevði komið summum teirra væl við, sigur ein sannførdur Pauli Nielsen, stjóri á Føroya Læraraskúla, sum eisini hevur pedagogútbúgvingina um hendi.


Güettler, Helmsdal, Jónsdóttir:

NEI!
segði lítla skrímsl

Ein bók um at tora at siga nei.

Væl egnað til upplesing og prát.




Bókadeild Føroya Lærarafelags
Pedda við Steingøta 9
100 Tórshavn
Tel. 317644 Fax 319644
www.bfl.fo/bfl@bfl.fo



Orð: Finnur Helmsdal

# Fjølment og fjølbroytt LEIÐARASTEVNA

Hósdagin 4. og fríggjadagin 5. november var leiðarastevna hildin á Hotel Føroyum. Stevnan er ætlað øllum teimum, sum hava leiðandi starv innan dagstovnar og dagrøkt. Uppmøtingin var stak góð, og fingu stevnuluttakararnir tveir fjølbroyttar og spennandi dagar, har alt frá løgfrøði til námsfrøði var viðgjørt. Alt frá politikki til arbeiðið úti á stovnunum varð tugt og tanlað. Alt undir kønari og kvikari leiðslu av Jan Willemoes, sálarfrøðingi.

Nógvir fyrilestrar vóru á skránni, og sjálvt um allir vóru líka viðkomandi, hava vit valt at viðgera tveir av teimum hesaferð. Tað snýr seg um Jákup Foldbo, ið tosaði um leiklut kommununar í dag og tað, sum kommunurnar kundu hugsað sær at gjørt, m.a. tá tað um børn við serligum tørvi ræður. Hin fyrilesturin, vit skriva um, er tann hjá Aibritt á Plógv, aðalstjóra í Almanna- og heilsumálaráðnum. Hon tosaði um støðuna á dagstovnaøkinum og síðan um, hvussu framtíðin kann fara at laga seg. Hetta við støði í dagstovnalógini og við tilvísing til faktorar, hvørs ávirkan er metbar og ikki metbar.

Spurningurin um, hvør lagnan hjá dagstovnalógini og eisini dagstovnaøkinum verður, tykist vera óloysiliga samanknýttur við spuningin um, hvussu kommunala økið verður skipað í framtíðini. Tí halda vit, at júst hesir báðir fyrilestrar er aktuellir og munnu hava áhuga millum flestu okkara.

## Aðrir fyrilestrar

Aðrir fyrilestrar, sum vóru á skránni hesar dagarnar, vóru hildnir í hesu raðfylgju. Jórun Niclasen, samskipari av barnaansingini í Klaksvíkar Kommunu, lýsti úrslitið av kanning, hon hevur gjørt saman við Ingun M. Jacobsen viðvíkjandi dagstovnalógini. Um hvussu væl leiðarar kenna lógina, og í hvønn mun hon merkir dagliga arbeiðið. Jórun og Ingun eru farnar undir at gera eina aðra kanning, sum partvís byggir víðari á ta fyrru, og verður tí bíðað við at skriva nakað um hetta, inntil úrslitið frá seinnu kanningini fyriliggur.

Síðan tosaði Jarvin F. Hansen um dagstovnalógina sæð út frá einum fakpolitiskum sjónarhorni. Sjónarmið, sum helst ikki er neyðugt at taka við her, tí tey koma til sjóndar á so nógvum øðrum støðum. Síðan tulkaðu Rógvi Thomsen og Mourits Foldbo grein 2 í dagstovnalógini. Ein fyrilestur, sum vónandi kemur í okkurt annað Pedagogblað. Judith í Brekkunum, pedagogur á Lítlaskógi, tosaði um arbeiðið á stovuni, meðan Hanna Thøgersen, leiðari í Mylnuhúsinum, lýsti arbeiðið á stovnunum. Jesper Roos Nielsen, leiðari í Øksnagerði tosaði um stovnspraksis. Alt slíkt, sum eigur innivist í komandi bløðum.

Vit kunnu leggja afturat, at Hotel Føroyar megnaði at skapa ein virðiligan og viðkomandi karm um stevnudagarnar. Glæsiliga úrvalið av frukt mundi koma mongum stevnugesti væl við.



# Dagstovnalógin má endurskoðast

## og ikki minst grein 5, sum snýr seg um børn við serligum tørvi

Orð: Finnur Helmsdal

Jákup Foldbo, leiðari á sosialu deild í Runavíkar kommunu. Hann umboðaði tey sjónarmiðini, sum ein av landsins stóru kommunum hevur í mun til barnagarðsøkið. Og hevur Runavíkar kommuna hesa yvirornaðu visión:

- kommunan skal veita ansingartrygd
- góðskan á barnagarðsøkinum skal vera góð:
- fyri børn við vanligum ansingartørvi
- fyri børn við serligum tørvi vegna brek
- fyri børn við serligum tørvi av sosialum orsøkum

Jákup vísti síðan á, hvørjar løgfrøðisligar karmar ein kommuna hevur at virka innanfyri, og er tað:

- Dagstovnalógin
- Forsorgarlógin
- Barnaforsorgarlógin

Jákup Foldbo sigur, at lóggávan hevur stóran týdning fyri, hvussu væl og skilagott økið verður umsitið. Hann sigur eisini, at tað gevur ikki góðar fyritreytir fyri einum samanhangandi og samskipaðum arbeiði, tá økið, sum nú, er býtt millum land og kommunur. Tær broytingar, sum eru ávegis, geva, um rætt verður atborið, munandi betri fyritreytir. Jákup Foldbo sigur, at ógreitt ábyrgdarbýti gevur í ringasta føri:

- kassahugsan
- avmarkan í førleikamenning
- ábyrgdarloysi

Jákup vísir á, at skal lóggávan verða uppbýtt, sum hon er tað ídag, so krevur hetta eitt sera gott og smidligt samskifti millum lands- og kommunalar myndugleikar. Hetta samskiftið er ikki ídag, og tað tykist vera rættiliga torført at fáa í lag.

## Greitt ábyrgdarbýti

Síðan dagstovnalógin kom, er talið á ansingarplássum økt munandi í Runavíkar kommunu. Hann sigur: "Uppgávu- og ábyrgdarbýtið skal vera so greitt, at tað ikki skal kunna bera til at skúgva bert minstu trupulleikarnar víðari har, sum landið hevur ábyrgdina. Hvørki stovnur ella starvsfólk mennast í nóg stóran mun, um tað er reglan, at flestu børn við serligum tørvi verða send víðari." Jákup leggur dent á, at við greiðum ábyrgdarbýti:

- verður tað ein fíggjarligur fyrimunur hjá kommununi, um hon megnar at greiða flestu ansingar/menningar uppgávurnar innan vanligu barnaansingina
- verður uppgávan at menna førleikan innan vanligu barnaansingina
- verður ráðgivið á staðnum, førleikamenningin tekur støði í praksis
- verður menning av og samstarv um serlig tilboð, tá vanlig barnaansing ikki megnar uppgávuna

## Lógin og normeringin

Jákup Foldbo heldur, at dagstovnalógin heldur ikki er nøktandi, tá tað um normeringarnar á stovnunum ræður. "Tað er ikki lætt at fáa pedagogar í starv, og

er støðan hjá nógvu hjálparfólkunum ikki haldbar. Hesi sita ár eftir ár í avloysarastørvum, tí pedagogar ikki søkja hesi. Hetta kunnu vit ikki bjóða teimum, og er starvsligi menningarmøguleiki teirra avmarkaður undir tilíkum umstøðum, og gongur hetta fyrst sum síðst út yvir børnini", sigur Jákup. Og hann fer so langt í sjónarmiðum sínum um normeringar á dagstovnum, at hann heldur, tað ikki skal vera ásett í lógini, at størvini skulu mannast við pedagogum, og at tað heldur ikki skal vera eitt krav, at leiðarin skal hava pedagogútbúgving. Jákup helt, at her kundi verið søkt meira breitt, soleiðis at skilja, at aðrir starvsfólkabólkar kunnu koma upp á tal. Sum Jákup málbar seg, so eigur fokus at verða flutt frá nøgd til dygd, og her eiga pedagogarnir sjálvir at arbeiða virkið og miðvíst. (Tað skuldi kanska ikki verið neyðugt at nevnt, at flestu fundarluttakararnir vóru ikki fult samdir við Jákupi, tá tað snúði seg um normeringar og útbúgvingarkrøv. Treyðugt so komu sjónarmið úr salinum um leiðsluútbúgvingar og tvørverkligt samstarv. Annars vóru fyrivarni tikin við støðd av kommunum og teimum trupulleikum og forðingum, sum av tí kunnu standast. Hesum var Jákup ikki ósamdur í, men hann helt, at loysnir kundu finnast á hesum eisini).

### Endurskoða dagstovnalógina

Jákup Foldbo vísir á, at tað tí er neyðugt at endurskoða dagstovnalógina, og ikki minst grein 5, sum snýr seg um børn við serligum tørvi. Í dag er hendan greinin bert ein stuttur setningur, sum vísir til tilboð veitt sambært aðrari lóggávu. Trupulleikin er bert, at ongin onnur lóggáva er gjørd enn. "Tað er tvingandi neyðugt, at politiski myndugleikin fer undir at endurskoða dagstovnalógina, ikki minst við atliti at grein 5, soleiðis at tað ber til at arbeiða og virka sambært lógini á hesum øki.

Jákup sigur, at tey hava góðar vónir um nýggju barnaverndarlógina, sum fer at leggja fyribyrgjandi barnavernd út til kommunurnar.

### Góðskan

Hvat viðvíkur góðskuni í barnaansingartilboðnum helt Jákup, at hendan væl kundi gerast góð og nøktandi, um starvsfólkabólkurin ikki bara telur pedagogar. Og Jákup helt somuleiðis, at góðskustøðið heldur ikki nýtist at verða hótt, hóast kommunan setir sær sum mál at veita borgarunum ansingartrygd. Tað snýr seg fyrst og fremst um rættar lógarkarmar og síðan um rættan hugburð, sigur leiðarin á sosialu deild í Runavíkar kommunu.

---

# Uppgávubýtið sambært dagstovnalógini

**Landsstýrismaðurin:**

- námfrøðilig ráðgeving og vegleiðing (§2, stk. 2)
- ásetur reglur um námsfrøðiliga stevnumiðið (§3, stk. 3)
- góðkenning av upptøkureglunum (§4, stk. 2)
- kunnast um stovnsetan (§7, stk. 1)
- áseta reglur í kunngerð um varandi undantaksloyvi frá útbúgvingarkravi (§10, stk. 2)
- heimild at steðga virksemi á stovni (§10, stk. 3)
- áseta nærri reglur um eftirlit (§10, stk. 4)
- kærumyndugleiki borgaranna (§11, stk. 1)
- kann játta frávik frá kærufreist (§11, stk. 3)
- kann flyta kæruviðgerð til eina kærunevnd (§11, stk. 4)

**Kommunurnar:**

- játtan av fríplássum (§3, stk1)
- heimild at hava opið alt samdøgrið (§3, stk. 2)
- heimild at játta pláss til børn, sum ikki eru skrásett í kommununi (§4, stk. 1)
- gera upptøkureglur (§4, stk. 2)
- rinda rakstrarárútreiðslur (§6, stk. 1)
- rinda húsaútreiðslur (§6, stk. 2)
- heimild at góðkenna serskipan fyri gjaldi á privatum stovnum (§6, stk. 3)
- skal kunna landsstýrismannin um stovnsetan (§7, stk. 2)
- heimild at jáata fyritøkum o.l. loyvi at stovnseta dagstovn (§7, stk.2)
- syrgja fyri at útvega neyðugar góðkenningar sambært aðrari lóggávu (§7, stk. 3)
- setur leiðarar í starv (§8, stk. 1)
- heimild at víkja frá útbúgvingarkravi til leiðaran í avmarkað tíðarskeið (§8, stk. 2)
- setir onnur starvsfólk eftir tilmæli leiðarans (§8, stk. 3)
- gera viðtøkur fyri foreldraráðini at virka sambært (§9, stk. 5)
- hava eftirlit við dagstovnum og dagrøkt (§10, stk. 1)
- heimild at steðga virksemi á stovni (§10, stk. 3)

---

## Aibritt á Plógv, aðalstjóri:

# Barnagarðsøkið royndarverkætlan

Orð: Finnur Helmsdal

**Aðalstjórin í Almanna- og heilsuráðnum, Aibritt á Plógv, tosaði um dagstovnalógina, um ábyrgdarbýtið millum land og kommunur og annars eitt sindur um nútíð og framtíð. Aibritt gjøgnumgekk lógina, fyrst við stuttum søguligum baksýni, síðani grein fyri grein. Alt við atliti at lutfallinum millum løgfrøði og politikk og ábyrgdarbýtinum millum landsmyndugleikar og kommunalar myndugleikar.**

### 12 greinar og 13 broytingar

Aibritt á Plógv greiddi frá, at løgtingið tók í 1999 avgerð um, at dagstovnaøkið skuldi leggjast út til kommunurnar at umsita. Landsstýriskvinnan í almanna- og heilsumálum, Helena Dam á Neystabø, legði lógaruppskot hesum viðvíkjandi í 12 greinum fyri tingið. Trivnaðarnevndin fór grundiga til verka, og framdi hon ikki færri enn 13 víðfevndar broytingar, sum tingið síðan samtykti allar.

Tað var semja í samgonguni tá um, at útleggingin av dagstovnaøkinum skuldi vera ein royndarverkætlan í mun til tað, at leggja ábyrgdarøki frá landi út á kommunur. Semja var í samgonguni tá um, at tað ráddi um at fáa eitt greiðari ábyrgdarbýti millum land og kommunur, og at tað fór at tæna borgarunum betur, um tænasturnar lógu nærri teimum.

### Speglast ábyrgdarbýtið í dagstovnalógini

Aibritt á Plógv spurdi tí, um greiða ábyrgdarbýtið nú speglast aftur í dagstovnalógini. Er tað so lætt hjá teimum ymsu pørtunum at finna út av, hvør hevur ábyrgdina fyri hvørjum á dagstovnaøkinum? Og er alt nú so greitt og skilagott uppbýtt? Aibritt sigur, at tað er ikki óvanligt, at ein lóg sum dagstovnalógin verður endurskoðað eftir nøkrum árum. Umframt heldur hon, at ógvusligu broytingarnar, sum trivnaðarnevndin fekk framt, eisini hava gjørt sítt til, at ikki altíð er samsvar millum lóg og viðmerkingarnar. Aibritt greiddi frá, at tey høvdu orðað eina kunngerð til lógina, og at henda varð send út til ummælis. Tey hava síðan fingið nógvar áheitanir um ístaðin fyri at gera eina kunngerð so heldur endurskoða lógina. Hesum ynski ætlaðu tey at ganga á møti, men er trupulleikin bert tann, at fólkið, sum hevur arbeitt við málinum, nú er farið í annað starv. Men ætlanin hjá A&H er framvegis at endurskoða lógina.

### Setur spurningar

Aibritt á Plógv gjøgnumgekk síðan lógina grein fyri grein og nýtti í hesum sambandi høvi til at gera vart við nakrar av teimum spurningunum, sum tey seta við verandi lóg. Aibritt svaraði ikki hesum spurningunum, ikki tí hon ikki hevur svar, men meira tí tað ikki júst er hennara lutur.

### Stevnumiðið politiskt

Spurnartekin verða longu sett við fyrstu greinina, sum er soljóðandi: "Løgtingslógin fevnir um virksemi á dagstovnum og dagrøktum, sum í samráð við foreldraráðið virkar fyri uppaling og menning av børnunum sambært fullgóðari námsfrøðiligari stevnu." Aibritt spurdi, um hetta er ein lýsing av gildisøkinum ella politiskt stevnumið. Í grein 2, sum lýsir endamálið, spurdi Aibritt, um grein 2, stk. 1 lýsir, hvat slag av børnum, dagstovnar skulu "tilevna". Stk. 2 sigur, at lands-



Aibritt á Plógv,
a›alstjóri í Almanna- og Heilsumálará›num

stýrismaðurin skal veita kommununum ráðgeving og vegleiðing í námsfrøðiligum spurningum. Spurt var, um økið ikki er lagt út. Grein 3, stk. 1 sigur, at kommunan kann geva børnum, sum búgva í kommununi, tilboð um pláss á dagstovni ella dagrøkt... Aibritt heldur, at ein kann vera í iva um, hvørt talan er um skyldu ella vilja kommunnar. Hon setti eisini spurnartekin við, hví landsstýrismaðurin skal hava heimild til at áseta neyvar reglur um námsfrøðilig stevnumið, starvsfólkasamanseting o.a., sum er ásett í grein 3, stk.3. Hetta tá økið er lagt út. Viðvíkjandi grein 4 spurdi Aibritt, hvat merkir "skrásett búgvandi", og hví landsstýrismaðurin skal blandast upp í upptøkureglur hjá kommunalum myndugleika.

## Tey arbeiða við grein 5

Grein 5 í dagstovnalógini snýr seg um børn við serligum tørvi. Verandi orðing er bert ein meðallangur setningur, sum sigur, at hesi børn fáa hølisumstøður, viðgerðar- og námsfrøðilig tilboð sambart aðari lóggávu. (Trupulleikin er bert tann, at í 2004 er enn eingin onnur lóggáva komin, og at hesi børn tí hanga í leysum lofti. Blaðm.) Aibritt hevði ikki stórt aðra viðmerking til grein 5, enn at landsstýrismaðurin arbeiðir við málinum í løtuni.

## "En varm kartoffel"

Grein 6 snýr seg um, hvør skal gjalda dagstovnaøkið. Tað skulu kommunan og foreldrini í felag. Tí undraði tað Aibritt, hví landsstýrismaðurin hevur heimild til at áseta hægst loyvda foreldragjaldið. Aibritt upplýsti, at kommunur og foreldur rinda rakstrarútreiðslurnar, meðan kommunan letur 40% og landið hini 60%, tá tað um hølisútreiðslur ræður.

Grein 7 sigur, at kommunan kann seta á stovn dagstovnar og dagrøkt, og at hon skal kunna landsstýrismannin um hetta. Spurningurin er so, nær rætta løtan er fyri hesi kunning. Stk. 3 sigur, at kommunan skal hava góðkenning frá neyðugum myndugleikum áðrenn slíka stovnsetan. Er talan um eina upplýsing ella áseting um aðrar lógir?

Grein 8, stk.1 sigur: "... kommunan setir ein leiðara fyri dagstovnin ella dagrøktarskipanina við námsfrøðiligari útbúgving." Stk. 2 í somu grein sigur m.a., at kommunan kann í tíðaravmarkað skeið gera undantak frá kravinum um námsfrøðiliga útbúgving. Aibritt spurdi: Ein leiðara til hvønn stovnin, hvat merkir tað? Og hon setti eisini spurningin: Hví hava útbúgvingarkrøv í eini lóg? Er tað ikki er ein sáttmálaspurningur? Annars loyvdi aðalstjórin sær at kalla stykkið um undantaksregluna fyri "en varm kartoffel". Hon helt, at ásetingin í grein 8, stk. 3 er óvanlig, tí kommunan skal blandast uppí, hvørji starvsfólk leiðarin setir í starv, og ivaðist í, um kravið um starvsfólkabýtið á stovnunum er í tráð við veruleikan, og um kommunur og námsfrøðingar kunnu nøkta hetta krav.

## Sjálvseftirlit

Grein 10 sigur, at kommunan hevur eftirlit við dagstovnum og dagrøktum. Aðalstjórin spurdi, um kommunan skal hava eftirlit við sær sjálvari. Stk. 2 sigur, at landsstýrismaðurin hevur yvirskipaða eftirlitið. Og er ein sjálvsagdur spurningur er, hvussu langt eftirlitið hjá landsstýrismanninum røkkur, nú økið er lagt út til kommunurnar at umsita. Og hon spurdi eisini, hvørjir partarnir eru í einum sovorðnum eftirlitsmáli. Aibritt vísti á, at ásetingarnar í grein 10, stk. 3 um, at landsstýrismaðurin kann støðga virkseminum á einum dagstovni ella dagrøkt, um krøvini í lógini ikki verða hildin, er einasta revsireglan, sum landsstýrismaðurin kann nýta.

Grein 11 snýr seg um kærumøguleikar, og spurt verður: "Hvat slag av avgerðum er talan um, og hvørjir partar kunnu kæra."

## Nútíðin - framtíðin

Við at greiða frá søgugongd og sjálvari lógini og teimum ivamálum, sum valda um hana, hevði Aibritt lýst nútíðina. Síðan kom hon inn á framtíðina. Um, hvøjir faktorar fara at ávirka, kendir sum ókendir. Og hon vísti á, at nógv ymiskt viðurskifti fóru at hava týdning í spurninginum um, hvønn veg dagstovnalógin mundi fara. Aibritt segði, at skal ein meta um framtíðina, so má ein spyrja, hvat er vist, og hvat er óvist. Hvat fær lítla ávirkan og hvat fær stóra ávirkan. Sum metbarar faktorar nevndi Aibritt fóltatal um 5 - 30 ár, barnatal um 5 - 30 ár og so aldurssamanseting millum børn, ung, arbeiðandi og pensionistar. Sum ókendar faktorar nevndi hon: Landspolitikkin, kommunalpolitikkin, kommunusamanleggingar, fíggjarlig viðurskifti hjá landi og kommunum og at enda eksternar faktorar. (Slíkt, sum hendir aðrarstaðni og ávirkar okkum. Blaðm.)

## Fólkavøkstur

Aibritt kom við áhugaverdum metingum um miðal fólkavøkstur. Frá 1997 - 2002 lá árligi miðalvøksturin út móti 2 prosentum í Tórshavnar økinum og syðru helvt av Eysturoy, vøksturin lá annars úr 1 % út móti 1,5% í restini av landinum. Í Suðuroynni var vøksturin 0,2% og í Sandoynni minus 0,5%. Aibritt vísti fundinum talvu yvir framrokningar fyri árliga fólkavøksturin frá 2002 - 2027, sum vísti, at hesin allastaðni fer at liggja undir 1%, og at hann í Sandoynni og Suðuroynni fór at verða ávikavist 0,2 og 0,3 %. Aibritt vísti eisini á, at fólkatalið í miðstaðarøkinum fer at verða 17-27% hægri 2027 enn í 2002, og at tað í Suðuroy og Sandoy fer at verða 4-5% hægri í 2027. Útlitini fyri vøkstri í barnatalinum siga, at vit fáa minkandi barnatal fram til 2017. At vit fara at fá munandi hækking av 0-4 ára gomlum aftan á 2012 (hetta fær ávirkan á vøggustovu og barnagarðstørvin), og at tað tí verður eins stór hækking av 5-9 ára gomlum frá 2017 (hetta fær ávirkan á forskúla og skúlatørvin).

## Politikkurin av avleiðingum

Aibritt segði, at barnatal, politikkur og fíggjarviðurskifti hava stóra ávirkan á, hvussu dagstovnaøkið verður skipað í framtíðini. Og hon nevndi nøkur politisk viðurskifti, sum vit ikki rættiliga kunnu siga nú, hvussu tey fara at laga seg. Ríkisrættarliga støðan, landspolitiskar raðfestingar, útbúgvingarpolitikkurin, flyting av uppgávum út á kommunur, kommunalar samanleggingar og kommunalpolitiskar prioriteringar.

Um restin av dagstovnaøkinum, barnaforsorgarøkið, eldraøkið og skúlaøkið verða løgd út til kommunurnar, helt Aibritt, at avleiðingarnar kunnu verða:

- størri kommunalt sjálvræði
- hægri kommunuskattur og lægri landsskattur
- kapping millum kommunur um skattgjaldarar
- dagstovnaøkið vil fylla minni á fíggjarætlanunum hjá kommununum (í dag miðal 32%)
- landsstýrið bert eftirlitsuppgávur og kæruviðgerð

## Raðfesting og inntøkuskapan

Aibritt vísti á, sum sjálvsagt er, at fíggjarligu viðurskiftini og møguleikarnir eru altavgerandi í øllum hesum. Tí er spurningurin um, hvussu vit velja at raðfesta fíggjarliga í framtíðini. Aibritt spurdi:

- hvussu raðfesta landspolitikarar pening til dagstovnaøkið?
- hvussu raðfesta kommunalpolitikarar pening til dagstovnaøkið?
- hvørji onnur øki kappast við dagstovnaøkið um peningin?

Aibritt spurdi eisini, hvaðani pengarnir skulu koma frá:

- hvussu nógvir inntøkuskapandi íbúgvar verða at gjalda vælferðarsamfelagið?
- hvussu verður við blokkstuðlinum?
- koma nýggjar inntøkuskapandi vinnur?

Aibritt vísti á fundinum talvu, sum sigur, at serliga aftan á 2017 verða færri at gjalda gildið.

## Eitt av fleiri scenarium

Aibritt endaði fyrilestur sín við at vísa fundinum á eitt av fleiri møguligum framtíðarscenarium. Hetta sigur, at tá tað um lands- og kommunalpolitisk viðurskifti ræður, so fara vit møguliga at fáa:

- størri kommunalt sjálvræði
- størri eindir gjøgnum kommunusamanleggingar
- flyting av allari dagrøkt, barnaforsorg, skúlaøki og eldraøki til kommunurnar

Og tá tað um fíggjarviðurskifti ræður, fara vit møguliga at fáa:

- færri inntøkuskapandi borgarar
- kapping millum kommunur um bestu skattgjaldararnar
- privatisering av vælferðartænastum
- umfordeiling av skattainntøkunum og blokkstuðli millum land og kommunur

Men Aibritt legði dent á, at hetta bara møguliga verður soleiðis. Hennara seinastu orð eru: "Tykkara krystalkúla er líka góð sum mín."





# Av skipi í barnagar›
# -ein sonn kollvelting

- Eg haldi meg hava sera gott tol, sum eisini man vera eitt høvu›skrav, arbei›ir tú vi› børnum, og harafturat dámar mær ta› sera væl.



Fjallafípan er útibarnagar›ur Úti í Grøv í Klaksvík. Stovnurin lat upp 1. september 2002 og h‡sir 55 børnum. 11 starvsfólk eru á stovninum. Bert lei›arin er pedagogur, hini starvast øll sum hjálparfólk.

Óli er hjálparfólk á Fjallafípuni, sum er útibarnagarður úti í Grøv, og her hevur hann starvast í tvey ár.

Ein sannroynd er, at nógv flestu pedagogar eru kvinnur, og einki undantak er í Klaksvík. Av teimum tilsamans 11 starvsfólkunum á Fjallafípuni var Óli, tað fyrra árið hann starvaðist her, einsamalt mannfólk, men fyri ári síðani er ein komin afturat.

- Eg gekk sjálvur í barnagarði fyri stívliga tjúgu árum síðani, og tá hevði verið óhoyrt, og kanska beinleiðis skomm, at eitt mannfólk tók sær av børnunum á stovninum, men nú er eitt sindur øðrvísi. Hóast mannfólkini enn ikki eru mong í tali á hesum økinum, er hugburðurin broyttur mundi. Nú munnu tey vera fá, sum halda tað vera løgið, at mannfólk arbeiða á dagstovni, og sjálvur haldi eg, at mannfólk eru minst líka so væl fyri at røkja eitt tílíkt arbeiði sum kvinnur, heldur Óli, sum sigur seg hava havt tvey sera spennandi ár á arbeiðsplássinum.

Áðrenn Óli fór at arbeiða á Fjallafípuni, var tað fiskin, hann fekst við. Hann hevur verið við línubáti, onkrum smærri útróðrarbátum, og sum landari hevur hann eisini roynt seg.

### Men hvat fekk hann at royna seg í barnagarði?

- Eg haldi meg hava sera gott tol, sum eisini man vera eitt høvuðskrav, arbeiðir tú við børnum, og harafturat dámar mær tað sera væl. Men at fara úr fiskinum og í barnagarð, var eitt langt lop. Ein sonn kollvelting, sigur Óli, sum ikki hugsaði so nógv um at fara á pedagogskúla, tá hann byrjaði her.

- Eg haldi tað vera umráðandi at hugsa seg væl um, áðrenn ein fer at læra til pedagog. Um ein veruliga hevur hug til tess, og um ein er egnaður. Hetta er ikki ein útbúgving, har ein meira ella minni í óðum verkum fer á skúlabonk og fýra ár seinni kann kalla seg pedagog. Men eftir hesi bæði árini her á Fjallafípuni eri eg rættiliga sannførdur um, at hendan verður leiðin...



# Fjørutrøllið
# kom á vitjan













Í sambandi við ársdagin fyri dagstovnin Millum Bóla í Kollafirði hildu tey, at okkurt serligt skuldi gerast burturúr. Og tað gjørdu tey sanniliga eisini. Dagstovnurin kann valla liggja tættari sjóvarmálanum, enn hann ger, og tí var tað heilt natúrligt at gera okkurt, sum hevði við fjøruna at gera. Evnið var stutt sagt: Fjøran og tað, sum har livir og grør.

Í summum førum vóru børnini saman í bólkum um onkra ávísa uppgávu, og viðhvørt vóru øll saman, og væl dámdi teimum, tí í fjøruni var nógv at finna. Tey fangaðu krabbar, krabbagággur, krossfiskar, skrubbur og annað mangt. Í hesum sambandi høvdu tey fingið sær eitt rúm í kjallaranum á dagstovninum, har tey m.a. høvdu eitt stórt akvarium, og har fór mangt livandi í, sum tey høvdu fingið úr fjøruni. Ein dagin fingu tey høvi at taka ímóti einum báti, sum hevði verið við gørnum, og har var sum vera man eisini nógv spennandi at síggja og taka við sær.

Rúmið høvdu tey annars skipað soleiðis, at har var rættur fjørudámur. Umframt alt livandi høvdu børnini eisini gjørt fiskar, bátar o.a. úr pappíri og pappi, og fyri at gera alt meira veruligt og spennandi, var hóskandi ljós og ljóð sett til.

So mikið hugnaligt høvdu tey skipað seg í hesum serliga rúminum, at eitt fjørutrøll kundi ikki halda seg at koma á vitjan. Eitt sindur misjavnt var, hvussu børnini tóku ímóti tí. Onkur leyp beinleiðis um hálsin á tí, meðan onnur hildu seg meira aftur. Men til endans vandu øll seg við trøllið, sum tey hugnaði sær ófført saman við.




Orð: Solby A. Eliasen

# Frítíðarskúlin
## er ikki ein skúli

- Tá børnini koma til okkara, hava tey fingi› frí úr skúlanum. Vit eiga og skulu vir›a fríti›ina hjá børnunum, sigur Ann-Elisabeth Joensen, lei›ari á fríti›arskúlanum og næstforma›ur í Føroya Pedagogfelag. Hon leggur dent á, at ein fríti›arskúli als ikki hevur naka› sum helst vi› ein fólkaskúla at gera

Ann-Elisabeth Joensen, leiðari á frítíðarskúlanum í Hornabø, sigur, at tað er av alstórum týdningi, at rætturin hjá børnunum til frítíð verður virdur.

Og at vaksin virða sjálva frítíðina hjá børnunum.

- Ein frítíðarskúli hevur onki sum helst við ein skúla at gera, og eg má viðganga, at eg slettis ikki veit, hví tað eitur frítíðarskúli. Eg hevði viljað, at hatta orðið hvarv, tí eg áni ikki, hvaðani tað er komið, sigur hon.

Um ein hyggur í endamálsorðingina fyri pedagogútbúgvingina ella í dagstovnalógina, so finnur ein ikki orðið frítíðarskúli. Men frítíðarheim.

Ann Elisabeth heldur, at tað rætta var, at stovnurin fekk navnið frítíðarheim ella frítíðarstovnur. Tí talan er um ein dagstovn, har børn koma at verða í síni frítíð, til foreldrini eru liðug at arbeiða.

- Frítíð er ein rættur hjá børnunum, staðfestir hon.

### Hvør sín útbúgving

Ann Elisabeth sigur, at tað er stórur munur á førleikunum hjá einum pedagogi og einum lærara.

- Vit hava hvør sítt øki, tá tað kemur til at arbeiða við børnunum, staðfestir hon.

Lærarar verða útbúnir til undirvísing og fakliga frálæru, meðan pedagogiska útbúgvingin leggur dent á uppalingina og menningina av barninum og ger, at pedagogarnir hava ein førleika til at eygleiða og skapa trivnað fyri einstaka barnið.

- Uppgávan hjá okkum er at menna tey skapandi evnini hjá børnunum við atliti at styrkja teirra samleika, sjálvsvirði, sjálvkenslu og evni til at taka sær av egnum viðurskiftum. Okkara fakligi førleiki ger okkum før fyri at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum. Tað er styrkin hjá okkum, sum eru pedagogar, sigur Ann Elisabeth.

Hetta eru eisini førleikar, sum Ann Elisabeth leitar eftir, tá hon skal seta fólk í starv á frítíðarskúlan.

Endamálsorðingin fyri lærararnar sigur í stuttum, at lærarar skulu útbúgvast til fólkaskúlan og at leggja støði undir undirvísing í øðrum skúlaformum, meðan endamálsorðingin fyri pedagogar sigur, at pedagogar skulu útbúgvast til vøggustovu, barnagarðar, barna- og frítíðarheim, stovnar til børn við breki, viðgerðarstovnar og annað námsligt virksemi. Umframt hetta at geva tann greinliga námsliga førleika, ið er neyðugur at leggja ætlan um og menna uppalingarvirksemi við børnum, ungum og vaksnum í samfelagnum, har tey búleikast ella á einumhvørjum stovni.

- Bæði lærarar og pedagogar hava námsfrøði, men tað er innan fyri hvørt sítt øki. Lærarin til undirvísing og frálæru og pedagogurin til at uppala og menna tað einstaka barnið, sigur Ann Elisabeth.

Hon dylir ikki fyri, at setanin av læraranum í frítíðarskúlanum á Tvøroyri er eitt afturstig fyri tosið um samstarv millum Pedagogfelagið og Lærarafelagið.

- Hatta hevur skapt ónøgd, og eg haldi ikki, at landsins myndugleiki hevur skilt, hvat ein frítíðarskúli í veruleikanum er, sigur hon.

Samstundis spyr hon, hvat endamálið er við at útbúgva pedagogar, um ongin munur skal vera á størvunum sum lærari ella pedagogur. So kundi alt bara verið lagt saman sum ein og sama útbúgving. Tað hevði hon kunna hugsað sær at hoyrt frá Lærarafelagnum um.

- Men eg má siga, at eg dugi ikki at síggja frítíðarskúlan uttan fyri dagstovnalógina, sigur Ann Elisabeth Joensen, leiðari á frítíðarskúlanum í Hornabø og næstformaður í Føroya Pedagogfelag.

### Fyrimynd í ES

Herfyri vísti formaðurin í Føroya Lærarafelag á, at børn kundu gjørt síni skúlating í frítíðarskúlanum.

Ann-Elisabeth sigur, at um eitt barn setur seg at gera skúlating, meðan tað er hjá teimum, er tað ongin, sum forðar tí.

- Okkara tilboð skulu vera so góð, at børnini als ikki hugsa um skúlan, meðan tey eru hjá okkum, sigur Ann Elisabeth og vísir á, at á frítíðarskúlunum arbeiða tey við teimum skapandi evnunum hjá børnunum, og eru møguleikarnir fyri at menna tað einstaka barnið tískil góðir.

Frítíðarskúlarnir kring landið hava eitt tætt samstarv og hava regluligar fundir, har leiðararnir hittast.

Allir leggja teir dent á at hava eina breiða viftu av tilboðum til børnini, so børnini hava nógv at velja ímillum, meðan tey eru á frítíðarskúlanum.

- Men her skal sigast, at á øllum frítíðarskúlum verður dentur fyrst og fremst lagdur á tað fría spælið hjá børnunum, sigur Ann-Elisabeth.

### Ann-Elisabeth samanber tað við fyrr

Tá børnini vóru úti á gøtuni og spældu og fóru so eina løtu heim at spæla ella okkurt líknandi. Tað er tað sama við frítíðarskúlanum. Tey gera sjálvi av, hvat tey gera og hava frítíðarskúlan at koma aftur til.

Tey hava eina ávísa fríheit, meðan tey eru á stovninum, og tey vaksnu eru altíð til staðar og eygleiða tey. Bæði menningina og trivnaðin.

> **FAKT**
>
> **um Frítíðarskúlan í Hornabø**
>
> Frítíðarskúlin á Hornabø er normeraður til 50 børn. 48 ganga har til dagligt, og har er altíð pláss fyri børnum við serligum tørvi.
>
> Seks starvsfólk eru knýtt at stovninum, harav fýra pedagogar og tvey hjálparfólk.
>
> Stovnurin, sum er í hjartanum í høvuðsstaðnum, hevur somleiðis ein útifrítíðarskúla, sum er í Havnadali. Tað er tann fyrrverandi Spírin.

Ann-Elisabeth er í einum norðurlendskum bólki, sum eitur NLS. Ein bólkur, sum umboðar øll fakfeløg í Norðurlondum. Hesin bólkurin arbeiðir við at gera ein bókling til ES, sum lýsir barnalívið í Norðurlondum.

Hon sigur, at tað hevur vakt stóran áhuga hjá hinum londunum, at frítíðin hjá børnunum verður raðfest so høgt í Føroyum. Hon tekur heildagsskúlarnar sum eitt dømi upp á vantandi virðing fyri frítíðini hjá børnunum.

- Norðurlond eru í roynd og veru ein fyrimynd fyri ES londini, tí har verður faklig innlæring raðfest alt ov høgt. Við tað at børnini ganga í heildagsskúlum, verður teirra frítíð gloymd í øllum hesum.

- Tað mugu vit fyri alt í verðini ikki fáa í Føroyum, staðfestir Ann-Elisabeth og leggur afturat, at har standa øll Norðurlondini saman.

- Tú virðir ikki børnini, tá tú ikki virðir teirra frítíð. Tey skulu mennast saman við øðrum børnum, slær Ann-Elisabeth Joensen fast.

# Hugnaðu sær
## við heimagjørdum



- og fyri pengarnar, sum inn komu, sluppu børnini at bovla





Børnini í Innistovu í Býlingshúsinum á Norðasta Horni hava nú í longri tíð stákast dúgliga. Tað hava bakað køkur, kókað bomm, glaserað súrepli, gjørt piparnøtur og sleikisneisir, klipt og sett saman jólapynt og alt møguligt annað. Alt hetta, til hin stóri dagurin skuldi koma, tá foreldur, systkin, ommur og abbar skuldu koma at vitja, og helst eisini keypa okkurt av tí, børnini høvdu gjørt. Og tey komu eisini fjølment og keyptu dúgliga. Pengarnir skuldu nýtast til ein túr í bovlinghøllina.

Hesa ferðina vóru tey í Býlingshúsinum tó meira varin við, hvar tey goymdu pengarnar, tí eitt líknandi tiltak høvdu tey eisini undan jólum í fjør, men tá fingu tey vitjan av óbodnum gestum, sum fóru avstað við pengunum. Hesum vóru børnini sera kedd av, og tað vildu tey ikki uppliva aftur.

Men tá neyðin er størst er hjálpin næst. Soleiðis var í fjør, tá tey í Býlingshúsinum hittu eina konu í Tilhaldinum í Tórsgøtu. Hendan konan hevði eina heilsan til teirra frá systur síni í Sveits. Ein brævbjálva við 900 krónum í. Hendan systurin í Sveits hevði lisið í bløðunum um tjóvin og ólukkuligu børnini, og henni tókti so hjartaliga synd í teimum, at hon sendi teimum pengar, so tey hóast alt ikki blivu snýtt fyri túrin í bovlinghøllini. Um fitta konan í Sveits lesur Pedagogblaðið, er kanska ivasamt, men skuldi hon gjørt tað, vilja øll í Býlingshúsinum á Norðasta Horni enn einaferð takka og ynskja henni eini gleðilig jól.





# Børnini á Barnaheiminum
## geva út fløgu

Undan jólum í fjør sungu børnini á Barnaheiminum fýra sangir inn á fløgu, og hóast nýggjasta tøknin ikki var nýtt í sambandi við upptøkuna, eydnaðist hetta teimum so mikið væl, at tey høvdu hug at royna aftur í ár. Ingi Hansen, pedegogur á Barnaheiminum, hevur hjálpt børnunum við tiltakinum, sum tey hava arbeitt við í longri tíð. Børnini hava sjálvi gjørt nøkur av løgunum og skriva sangir. Tónleikararnir eru nakrir av okkara mætastu, og upptøkurnar eru gjørdar í veruligum tónleikastudio. Harafturat syngja nakrir kendir sangarar saman við børnunum.

Ingi Hansen sigur, at øll børnini á Barnaheiminum, sum høvdu hug til tess, umframt nøkur, sum áður heva búð á heiminum, hava verið við í verkætlanini. Umframt at nøkur teirra syngja og spæla, hava onnur verið við í øðrum fyrireikingararbeiði, m.a. at tekna fløguhúsan.

Fløgan er júst útkomin, men hóast vit eru beint undan jólum, er ikki talan um beinleiðis jólafløgu. Úrvalið á fløguni er ógvuliga fjølbroytt, og Ingi heldur, at børnini hava allar orsøkir at vera nøgd við úrslitið, sum fyrst og fremst er teirra verk.

Fløgan verður seld í ymsum handlum kring landið, og verður nakað avlop av søluni, er ætlanin at nýta hetta at keypa eitt heimastudio til Barnaheimið. Tá verður lagamanni at halda fram við hesum tónleikaítrivinum, og haraftrurat møguleiki fyri at gera eitt nú útvarpsleikir, sum tey ætla at bjóða útvørpum okkara.

**Tónleikararnir á fløguni eru m.a. Kim Hansen, Niclas Johannesen, Jens Marni Hansen, Jón McBirnie, James Olsen, Heðin Z. Davidsen, Mikael Black og Brandur Jacobsen. Tey, sum syngja saman við børnunum, eru m.a. Pætur við Keldu, Kim Hansen, Eivør Pálsdóttir, Jens Marni Hansen og Terji Rasmussen**




**Ingi Hansen,** pedagogur á Barnaheiminum, er so miki› væl nøgdur vi› fløguna, at hann ivast ikki í, at okkurt av løgunum ver›ur at hoyrta í útvarpinum - meira enn ta einu fer›ina.



# Týpan...

***Her er Heini. Hann er stjóri. Heini er troyttur av (á)ganginum á skrivstovuni, og nú vil hann hava frid. Heini er týpiska ímyndin av, at tad hevdi loyst seg hjá honum at hugsad meira um røttu trygdina hjá sær og starvsfólkunum.***

***Føroya Lívstrygging kann bjóda eina trygd, id júst er grundad á avtalu millum leidslu og starvsfólk. Skipanin eitur Virkiseftirløn og er ein skraddaraseymad loysn vid bædi trygging og eftirløn.***

Virkiseftirløn er ein eftirlønarskipan við innbygdari trygging.
Virkiseftirløn er grundað á, at ein partur av lønini verður goldin inn í skipanina.
Tá ið eftirlønin verður goldin út, ræður starvsfólkið sjálvt fyri, hvussu hetta skal gerast.
Veljast kann ímillum at fáa alt goldið út í einum ella sum mánaðargjald.

Hann er stjóri

Føroya Lívstrygging · Kopargøta 1 · Postsmoga 206 · 110 Tórshavn · Tel 311111 · Faks 351110
heimasíða www.liv.fo · teldupostur liv@liv.fo

LÍV
Føroya Lívstrygging

REPROZ